Tíðindablaðið sosialurin Telefon 311820 Telefax 314720 Internetadressa: www.sosialurin.fo e–mail: post@sosialurin.fo

# Ríkisfundurin er eitt gott tiltak

*Fyrrverandi løgmenninir, Atli P. Dam og Edmund Joensen eru samdir um, at óformellir ríkisfundir kunnu slóða fyri betri samstarvi*

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

Ríkisfundurin millum danska forsætisráðharran Poul Nyrup, Føroya løgmann, Anfinn Kallsberg og grønlendska landsstýrisformannin Jonathan Motzfeldt er av á hesum sinni og úrslitið av hesum fundi eigur at vera, at nakrar forðingar eru fingnar av vegnum í komandi samstarvi. Hetta eru í hvussu er royndirnar hjá tveimum føroyskum løgmonnum. Teir eru Atli P. Dam, sum í nærum eitt mannaminni var løgmaður og Edmund Joensen sum sat drúgvt skeið í nítiárunum.

–Fundirnir eru óformellir og ongan bindandi avtalur verða gjørdar, men mínar royndir eru, at hesir fundir kunnu slóða fyri betri samstarvið, sigur Atli P. Dam, fyrrverandi løgmaður.

–Poul Schuter tók stig til ríkisfundirnar. Teir vóru tó ikki regluligir í hansara tíð, ikki sum í dag, nú teir eru komnir í eina fasta legu, sigur Atli P. Dam.

**Gott tiltak**

Endamálið hjá Sambandsflokkinum er at menna samstarvið við danir og tí er tað ikki so løgið, at formaður Sambandsflokksins og fyrrverandi løgmaður, Edmund Joensen er ógvuliga positivur, tá tað snýr seg um ríkisfund millum tey trý londini í danska kongaríkinum.

– Eg haldi, at hetta er eitt sera gott tiltak, júst tí fundirnir eru óformellir og ein ikki er bundin av eini fastari dagsskrá, sum er avtalað frammanundan. Teir fýra ríkisfundirnir, eg havi luttikið á, hava verið opnir og erligir og teir hava eisini slóðað fyri at partarnir hava skilt hvønn annan betri eftir fundarlok, sigur Edmund Joensen, formaður Sambandsflokksins.

– Eg haldi, at hesir fundir eisini skuldu verið á embætismannastøði, fyri at fáa avgreiðsluna av teimum mongu málunum millum londini so smidlig sum gjørligt. Men embætismenn eiga ikki at vera við á sjálvum ríkisfundinum og tað hava teir heldur ikki verið higartil, sigur Edmund Joensen.

Edmund Joensen sigur, at ríkisfundirnir hava eisini verið við til at knýta Føroyar og Grønland nærri saman.



*Teir tríggir leiðararnir í londunum í kongaríkinum Danmark spáka uttanfyri góðsið á Fjóni, har ríkisfundurin varð hildin*
***Mynd: Nordfoto***

## Veðrið

**Fimmdaga-forsøgnin frá DMI**



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig. Um kvøldið frískar hann vindin av suðri.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og sirm ella mjørki. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og regn. Seinnapartin støkkur hann vesturum og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og landsynningi og regn av og á. Hitin millum 8 og 12 stig.




Lágtrýstið sunnanfyri Hvarvið fer spakuliga móti Íslandi og dýpist.




Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga móti Íslandi og kuldabrúgvin vestanfyri Føroyar fer um Føroyar sunnudagin.




**Hitalagið mált frá 09./08. kl 06⁰⁰–10./08. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,7°C**
Minsti hiti máldur í august: **0,2°** Mesti hiti máldur í august: **22,0°**




Avfallið: 22,0 mm – **mált frá 09./08. kl 6⁰⁰–10./08. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í august: 33,2 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 21 |
| Tromsø | 10 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannahavn | 19 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 21 |
| Bukarest | 27 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 32 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 31 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 18 |
| New York | 30 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 15 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 12 |

## Vestfalskyrrindi

7. aug.: Fyrra kvarter
11. aug.: Mánin longst frá jørðini
15. aug.: Fullmáni

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/ Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/ Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. aug. | 04.28 | 16.55 | 03.28 | 15.55 | 03.43 | 16.10 | 06.28 | 18.55 | 07.28 | 19.55 | 02.43 | 15.10 | 01.43 | 14.10 | 04.43 | 17.10 | 05.43 | 18.10 | 04.13 | 16.40 | 05.28 | 17.55 |
| 12. aug. | 05.20 | 17.45 | 04.20 | 16.45 | 04.35 | 17.00 | 07.20 | 19.45 | 08.20 | 20.45 | 03.35 | 16.00 | 02.35 | 15.00 | 05.35 | 18.00 | 06.35 | 19.00 | 05.05 | 17.30 | 06.20 | 18.45 |
| 13. aug. | 06.06 | 18.27 | 05.06 | 17.27 | 05.21 | 17.42 | 08.06 | 20.27 | 09.06 | 21.27 | 04.21 | 16.42 | 03.21 | 15.42 | 06.21 | 18.42 | 07.21 | 19.42 | 05.51 | 18.12 | 07.06 | 19.27 |
| 14. aug. | 06.47 | 19.06 | 05.47 | 18.06 | 06.02 | 18.21 | 08.47 | 21.06 | 09.47 | 22.06 | 05.02 | 17.21 | 04.02 | 16.21 | 07.02 | 19.21 | 08.02 | 20.21 | 06.32 | 18.51 | 07.47 | 20.06 |

Kelda: Skipalistin 2000


TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG




12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes